# ítróttur

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Í serflokki

*113 ratingstig fekk Martin Poulsen burtur úr kappingini, og tað er einki minni enn einastandandi flott av unga telvaranum, sum var bert hálvt stig frá fremsta plássinum í stóru kappingini*



**Unglingarnir Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen gjørdu rættiliga vart við seg við ávíkavist einum øðrum- og níggjunda plássi í sterkari opnari kapping í Barcelona. Tvey framúrskarandi úrslit.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fyrireikingarnar hjá vinmonnunum Hans Kristian Simonsen og Martini Poulsen til Talvolympiaduna eru farnar í gongd. Leiðin er farin til Spania har nógvar kappingar eru kring alt árið. Seks vikur eru til OL-startskotið í Bled, Slovenia. Báðir byrjaði heldur varliga,við tveimum stigum eftir fyrstu trý umførini í IV Open International í Barcelona, sum í ár hevði heili 390 luttakarar. Men eftir hesa annars hampiligu byrjan, varð tað sum um at telvað bleiv fyri dagligt breyð og yvirlivilsi restina av kappingini. Stigini skolaðu inn hjá báðum, og væl fylgdust teir gjøgnum alla kappingina.

### Vunnu á sama stórmeistara

Tann royndi stórmeistarin úr Ukraina, Viktor Moskalenko (2513) fekk av álvara føroyska framtíðartelving at smakka. Fyrst niðurspældi Martin stórmeistaran í sætta umfari, og bert trý umfør seinni framdi Hans Kristian sama kynstur ímóti tí nipna Moskalenko.

Tvey sonn undursúrslit, men ikki vórðu hetta einastu megnarúrslit hjá fremstu unglingum okkara. Hans Kristian vann eitt nú á altjóða meistara (eisini fingu báðir javnleik móti altjóða meistarum), og báðir vunnu móti fleiri telvarum yvir 2250 í rating.

Undan seinasta umfari høvdu báðir sjey stig av níggju møguligum, og sostatt vóru teir við í oddastríðnum. Í seinasta umfarinum leikti Hans Kristian javnt móti altjóða meistara, meðan Martin vann á væl hægri styrkismettum telvara. Tey átta stigini Martin fekk varð nóg mikið til eitt deilt annað pláss saman við sjey øðrum luttakarum, meðan Hans Kristian fekk eitt deilt níggjunda pláss, bert hálvt stig aftanfyri Martin og eitt stig aftanfyri vinnaran.

### Skarvslop á ratinglistanum

Tá hugsað verður um at 390 telvarar luttóku í kappingini, harav nakrir stórmeistarar og fleiri altjóða meistarar, eru úrslitini hjá føroyingunum einastandandi. Samstundis ger hetta Føroyar uttan iva sjónligari á altjóða talvpallinum.

Hóast góðu úrslitini, bleiv talan ikki um IM-normar. Men tey 113 (!) ratingstigini Martin fær aftrat sínum 2123 stigum, og tey 58 stigini Hans Kristian fær omaná sínum 2179 stigum, eru sjálvsagt kærkomin. Í løtuni gevur hetta teimum eitt fimta (Hans Kristian, 2237) og sætta pláss (Martin, 2236) á listanum, framanfyri eitt nú Ólavur Simonsen og Eyðun Nolsøe.



*Eisini Hans Krisitan Simonsen stóð seg væl í kappingini. Hann gjørdist nummar níggjur, og fekk 58 ratingstig*



# Todi hevur framvegis hug á landsliðnum

**Men hann heldur tað ikki vera ráðiligt at spæla við, tá Føroyar í næsta mánað fara til Litava og Týskalands**

LANDSLIÐIÐ

*Jóannes Hansen*

Ein av stóru yvirskriftunum á ítróttarsíðunum í Politiken í gjár var, at Todi Jónsson er á veg aftur á føroyska landsliðið. Teir hava tíðindini frá tíðindastovuni Ritzau, sum hevur tosað við Toda Jónsson.

– Eg havi einki sagt um nakra ítøkiliga avgerð, og um hatta er yvirskriftin í blaðnum, so hava teir spent bogan rættuliga nógv sammett við tað, sum eg havi sagt.

Hetta sigur Todi Jónsson, sum staðiliga undirstrikar, at hann er sera áhugaður í at spæla fyri Føroyar.

– Eg havi skilt á lagnum, at okkurt hevur verið frammi um, at eg ikki eri áhugaður í at spæla á landsliðnum. Tað harmist eg um. Í fjør gav eg fyribils avboð til landsliðið. Tá segði eg, at tað var av heilsuávum, og soleiðis er tað framvegis. Eg havi ikki hildið meg vera nóg væl fyri til at vera á landsliðnum.

Nær fert tú at boða venjaranum frá, um hann skal rokna við tær ella ikki?

– Tíbetur hevur tað gingið rætta vegin nógvu teir seinastu mánaðirnar. Tá Hans Backe kom til FCK í fjør, var eg skaddur, og eg hevði verið nógv skaddur. Hann nýtti góða sambandið, sum hann hevði til Eysturríki, har hann hevði verið venjari, og eg fór niður hagar. Har vandi eg, og tað hevur víst seg at hjálpa væl. Í hesum árinum havi eg ikki havt gomlu skaðarnar at dragast við. Nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður við skaðum í heyst. Um tað framvegis gongst væl, tá vit fara undir fyrireikingarnar til seinnapartin av kappingarárinum, so fari eg at gera upp við meg sjálvan, um eg skal teljast millum landsliðsevnini ella ikki, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

Tað vil siga, at tú verður ikki millum spælararnar, sum um miðjan oktober fara til Litava og Týskalands?

– Nei, tað verði eg ikki. Eg ynski landsliðnum alt tað besta, og eg fegnist um góða úrslitið, sum teir fingu ímóti Skotlandi. Eg fylgi teimum við stórum áhuga. Men samstundis er tað týdningarmikið fyri meg, at eg ikki eri skaddur í heyst. Um tað fer at gangast so mikið væl, so er møguleiki fyri, at eg seinni í vetur fari at boða landsliðsvenjaranum frá, at eg eri tøkur til landsliðið.

Todi Jónsson hevur ikki spælt so nógv við FCK síðstu tíðina, sum hann áður hevur gjørt. Kappingin um tey fremstu plássini á FCK liðnum er sera tøtt. Umframt Toda og Zuma, sum í vár vóru fastir á liðnum, eru Peter Møller og Jörgen Pettersson nú millum fremstu evnini til tey bæði álopsplássini.



*– Eg havi einki sagt um nakra ítøkiliga avgerð, og um hatta er yvirskriftin í blaðnum, so hava teir spent bogan rættuliga nógv sammett við tað, sum eg havi sagt, sigur Todi Jónsosn, nú Politikken skrivar, at hann aftur verður tøkur hjá føroyska landsliðnum*

# Steypakappingarnar vera eftir mánaðarskiftið

**Í hesum døgum biður FSF feløgini um av nýggjum at boða frá luttøku til steypakappingarnar, sum verkfallið í vár var orsøk til ikki vórðu spældar sambært upprunaligu ætlanini**

STEYPAKAPPINGAR

*Jóannes Hansen*

Í hesum døgum heitir FSF á fótbóltsfeløgini um av nýggjum at boða frá, um tey ætla at luttaka í steypakappingunum í yngru deildunum. Heitt verður á feløgini um at geva FSF skrivstovuni boð í seinasta lagið mikudagin í komandi viku.

– Tá vit hava fingið fráboðanirnar frá feløgunum, fara vit at leggja kappingarnar til rættis. Ætlanin er at fáa tær spældar tvey tey fyrstu vikuskiftini í oktober, sigur Karl Vidtfeldt, sum er formaður í kappingarnevndini hjá FSF og kappingarstjóri hjá yngru deildunum.

Bara tríggjar steypakappingar eru avgreiddar í ár. NSÍ hevur vunnið løgmanssteypið, KÍ hevur vunnið kvinnukappingina, og unglingarnir hjá HB hava vunnið sína steypakapping.

– Vit halda, at tað er neyðugt at biðja um nýggjar tilmeldingar, tí nú er so langt útliðið, síðani tilmeldingin til hetta kappingarárið varð gjørd, at tað kann hugsast, at grundarlagið undir liðunum er broytt nógv onkra staðni. Tey feløgini, sum hava fregnast um ætlanirnar í sambandi við steypakappingarnar hjá teimum yngru, hava fingið at vita um ætlanirnar, og tey hava tikið væl undir við teimum, sigur Karl Vidtfeldt.

Í FSF hava teir hugsað sær, at steypakappingarnar hjá gentum 14-17 ár og smágentum og hjá dreingjunum og smádreingjunum verða skipaðar sum vikuskiftiskappingar, tá landskappingin verður liðug.

### Verkfallið spældi eitt puss

Sambært skipanini so skuldu steypakappingarnar havt verið spældar nógv fyrr, og finalurnar skuldu havt verið undan summarsteðginum. Formaðurin í kappingarnevndini hevur hesa frágreiðingina um, at kappingarnar ikki eru spældar:

– Fótbólturin varð raktur av verkfalli tíðliga í ár. Tað hevði við sær, at vit vóru noyddir at umleggja, og tá raðfestu vit landskappingina fremst. Harafturat kom so, at tað hava verið trupulleikar við bussflutningingunum, síðani broytingar í viðurskiftunum hjá bussánarunum vóru frá 1. mai. Tíverri er hetta framvegis ikki komið heilt í rættlag, sjálvt um vit halda, at tað er púra greitt, hvussu flutningurin eigur at vera skipaður. Verkfallið og fleiri avlýsingar høvdu við sær, at okkum restaði tíð til landskappingina, og tí útsettu vit steypakappingarnar.

Karl Vidtfeldt sigur seg vóna, at feløgini fara at taka væl undir við vikuskiftiskappingunum, sum partvís eru ein neyðloysn. Men hann vísir samstundis á, at tað undanfarnu árini ofta hevur verið so sum so við steypakappingunum.

– Ofta stendur á dómaraseðlinum, at dysturin ikki varð spældur, tí annað liðið ikki møtti. Tíðliga á árinum eru øll feløgini ikki til reiðar at spæla tað, sum teimum verður álagt. Nú fáa vit at síggja, um fleiri dystir fara at verða avgreiddir í ár, nú kappingarnar verða seinni, enn tær plaga at vera, sigur Karl Vidtfeldt.



*Einasta av steypafinalunum í yngru deildum, sum enn er avgreidd, er tann hjá unglingunum, har HB vann finaludystin móti VB*

# Christian Høgni aftur á vongverjanum

**Nýggi maðurin hjá Vejle kom í miðdepulin, tá hann í Aarhus bæði skoraði og sá reyða kortið**

1. DEILD DANMARK

*Jóannes Hansen*

Eftir at hava stríðst í føroyska álopinum ímóti Skotlandi leygardagin var Christian Høgni Jacobsen týskvøldið aftur á Vejle liðnum, har hann enn eina ferð var allar 90 minuttirnar á vongverjanum í høgru. Orsakað av skaðum og leikbannum var, sammett við undanfarnu dystirnar, talan um stórar broytingar á Vejle liðnum.

Christian Høgni og Vejle óru í Riisvangen í Aarhus, har mótstøðuliðið var FC Aarhus, sum fyrrverandi álopsspælarin á danska landsliðnum, Flemming Povlesen, er stjóri í. Sammett við alspentu í hvussu so er 4.200 ásrkoðararnar á Svangaskarði leygardagin var karmurin ikki so ógvusligur í Aarhus, men ð var ikki heilt sørt. Dysturin var spennandi, og teir 815 áskoðararnir gingu uppí tað.

Úsrlitið varð 1-1. Efitr rfyrra umfarið var orsøk hjá Vejle at harmast um, at teir ikki vóru á odda meiri enn 1-0, men eftir allar 90 minuttirnar vóru teir ikki ónøgdir. Tá tað restaðu seytjan minuttir, stútaði FC Aarhus til 1-1, og so trýstu teir fyri at vinna. Í yvirtíðini fingu teir bóltin í Vejlemálið, men tá segði dómarin, at fríspark var gjørt ímóti Vejle.

Peter Degn, sum er komin úr Brøndby og til Vejle, var nýggjur á liðnum, og hann kom rættiliga í brennidepulin. Hann var á miðvøllinum í høgru, og harvið ikki so langt frá Christian Høgna. Peter Degn legði Vejle á odda, tá tað restaðu fýra minuttir av fyrra umfarinum. Bólturin varð lagdur aftur til hansara, og møguleikin var stórur. Frammanundan hevði hann eina ferð sent í stólpan.

Tá seinna umfarið var nígjan minuttir gamalt, varð Peter Degn rikin av vøllinum. Dómarin metti, at hann hevði hevnt seg. Tað vóru teir í Vejle ikki samdir við uppmanninum í, men tað hevði sjálvandi ikki so nógv at siga.

Eftir útvísingina trýsti FC Aarhus, men Vejle menninir fóru til hús við eina stiginum. Sunnudagin skulu teir spæla á heimavølli ímóti B1913. Seks dystir í donsku 1. deild vórðu leiktir í gjárkvøldi.